# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
TLF 341800

*– Tað er ikki lætt at spæla ímóti einum væl skipaðum liði sum Føroyum, men trýstið er á okkum til dystin. Vit skulu vinna*

*Steven Pressley, skotskur verjuspælari*

# Skotar eru klárir til dystin

**Allir teir úttiknu spælararnir hjá Skotlandi eru klárir til dystin ímóti Føroyum, og stórur áhugi er millum áskoðararnar fyri dystinum**

LANDSDYSTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í gjár savnaði skotski landsliðsvenjarin Walther Smith spælararnar, sum leygardagin skulu spæla EM-landsdyst ímóti Føroyum í Glasgow.

23 spælarar eru tiknir út til landsdystin ímóti Føroyum og tann ímóti Litava í næstu viku, og Walther Smith kundi fegnast um, at allir hansara spælarar eru frískir til dystin leygardagin.

Í gjár vandi skotska landsliðið fyri fyrstu ferð undan dystinum ímóti Føroyum, og fyrireikingarnar halda fram alla hesa vikuna.



*Skotar fyrireika seg væl til dystin ímóti føroyska landsliðnum leygardagin. Allir mans eru tøkir, og stórur áhugi er fyri dystinum millum áskoðararnar*

**Málskjúttin í kreppu**

Hóast skotski landsliðsvenjarin nú fyrireikar liðið til dystin ímóti Føroyum leygardagin, hevur hann alment sagt, at álopsspælarin Kenny Miller skal byrja inn í dystinum.

Kjakast hevur verið um, hvørt Miller er rætti álopsspælarin, tí hann hevur ikki gjørt nakað mál, síðani hann flutti frá Hibernian til Celtic at spæla í summar.

– Kenny hevur spælt sera væl fyri landsliðið, og tá ið ein spælari hevur avrikað so nógv fyri okkum, mást tú eisini vísa honum álit, sigur Walther Smith við The Scotsman.

– Við hvørt tekur tað tíð at finna seg til rættis í einum nýggjum felag, men eg eri vísur í, at Kenny við tíðini eisini fer at gera nógv mál fyri Celtic, sigur landsliðsvenjarin.

Harvið heldur Walther Smith fast í Kenny Miller sum álopsspælara á landsliðnum, hóast hann hevur verið fyri málturki í Celtic seinastu vikurnar.

**Skotar koma til dystin**

Áhugin fyri landsdystinum millum Skotland og Føroya er stórur. Dysturin verður spældur á leikvøllinum hjá Celtic, og har rúmast heili 60.000 fólk. Týsdagin vóru næstan 40.000 atgongumerki seld til dystin, og roknað verður við, at sølan fer eisini at ganga væl seinastu dagarnar undan dystinum.

Vanliga spældir skotska landsliðið sínar dystir á Hampden Park, men hesaferð verður roynt at spæla á Celtic Park, og tí heitir skotska fótbóltssambandið á áskoðararnar um at verða í góðar tíð til dystin.

– Fólk eru ikki so von við at vera til landsdyst á Celtic Park, og øll kenna ikki leikvøllin ella økið rundan um, og tí ræður um at verða í góðari tíð leygardagin, sigur skotska fótbóltssambandið.

**Føroyar á flog**

Í kvøld kl. 19.00 fer føroyska landsliðið á flog úr Vágum, og flogið verður beinleiðis til Glasgow, har Jógvan Martin Olsen hósdagin og fríggjadagin skal hava venjingar við sínum liði.

Stóra uppgávan verður at kveikja og skipa liðið, so at avrikið og úrslitið verða betur enn í fyrsta EM-dystinum fyri tveimum vikum síðani. Ta ferðina tapti Føroyar heili 6-0, og hóast talan skuldi verið um ein truplari dyst hesaferð, er málið hjá føroyska liðnum at fáa eitt munandi betur úrslit í Skotlandi.

Dysturin millum Skotland og Føroyar verður spældur leygardagin kl. 15.00.

## Formil 1 kalendarin kunngjørdur

**Týskarar og italiumenn mugu komandi kappingarár taka til takka við eini formil 1 koyring í heimlandinum**

FORMIL 1

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Formil 1 kalendarin fyri 2007 varð avdúkaður í gjár, á honum eru 17 koyringar, altso ein færri enn í ár. Belgiska koyringin á Spa, er komin inn á kalendarin aftur eftir eitt sabbatár. Hetta merkir so, at San Marino koyringin, ið verður hildin í Italia og evropeiska koyringin, ið verður hildin í Týsklandi, eru dotnar av kalendaranum.

Seinastu nógvu árini hava hesar koyringar tryggja at bilóðu tjóðirnar Italia og Týskland hava havt tvær koyringar, men við alt fleiri koyringum uttan fyri Evropa, har einki tubbaksforboð er, hevur tað leingi ligið í luftini, at hesi lond fóru at missa aðru koyringina. Tað skilst, at týska koyrinigin fer at skiftast við at vera á breytunum í Hockenheim og á Nurburgring. Meðan Monza tykist at vera fyrsta valið til italsku koyringina. Tað er tó enn væl møguligt, at 18 koyringar verða komandi kappingarár, tí millum koyringina í Bahrain 15. apríl og koyringina í Spania 13. mai eru fýra vikur, og hesin steðgur tykist ikki sannlíkur. So tað tykist, sum um samráðingar eru í gongd um, at ein koyring verður afturat, og her er San Marino koyringin ein møguleiki.

Av øðrum broytingum er kanska tann mest áhugaverda, at japanska koyringin flytur av Suzuki á Fuji breytina.

**Formil 1 kalendarin 2007**

Avstralia, 18. mars
Malaisia, 8. apríl
Bahrain, 15. apríl
Spania, 13. mai
Monako, 27. mai
Kanada, 10. juni
USA, 17. juni
Frakland, 1. juli
Stóra Bretland, 8. juli
Týskland, 22. juli
Ungarn, 5. august
Turkaland, 26. august
Italia, 9. september
Belgia, 16. september
Kina, 30. september
Japan, 7. oktober
Brasilia, 21. oktober

*(Kelda: f1.com)*

# Robbie Williams sleppur ikki at hita upp fyri Føroyar

**Robbie Williams hevur oyðilagt vøllin hjá ungarska landsliðnum, og fríggjakvøldið undan dystinum millum Skotland og Føroyar spælir enska poppstjørnan í Glasgow**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Robbie Williams er stórur fótbóltsfjeppari, men tá ið hann savnar túsundtals fólk á leikvøllum kring Europa, er tað ikki til fótbólt, men til tónleik.

Um vikuskiftið hevði Robbie Williams konsert á stadion í Budapest, har ungarska landsliðið vanliga spælir sínar dystir, men konsertin fór so illa við vøllinum, at ungarska fótbóltssambandið hevur biðið UEFA um loyvi at flyta EM-dystin ímóti Noregi leygadagin til annan vøll.

Sambært ungarska fótbóltssambandinum er ikki spælandi á vøllinum, eftir at Robbie Williams hevði sína konsert.

Enska poppstjørnan skal fríggjakvøldið og leygarkvøldið hava konsert í Glasgow í Skotlandi, men Robbie Williams sleppur ikki inn á Celtic Park, har landsdysturin millum Skotland og Føroyar verður spældur leygardagin.

Robbie Williams skal ístaðin hava sína konsert á hinum stóra leikvøllinum í býnum, Hampden Park.